# FYLGJA PÁL WEIHE ella HIPPOCRATES

*Ynskir Pál at strika læknalyftið?*

*I KVF sendingini ”Gentan er ikki deyð, hon svevur”, kom Pál Weihe við einum glepsi eftir Hippocrates, faðir læknavísinda, um kroppsveskuteori hansara.*

*”Hendan varð lýst at vera tað reina nonsens, og hevði gjørt meira skaða enn gagn!*

Hvat enn fekk Pál at glepsa eftir Hippocrates, virkandi lækni fyri 2.500 árum síðani, faðir at læknalyftinum:

*”Fyrst og fremst ger ongum skaða”!*

- so sýntist tað undrunarvert, nú fremsta óhefta vísindin, sum Heilsuverkið hevur lagt á ís, lýsir Covid átakið, Pál hevur staðið sum slóðari fyri, sum:




”***Størsta læknafrøðiliga mistak, nakrantíð framt síðani tíð Hippocratesar***”!

Eitt hjartanemandi átak, sum einans hevur framt víðfevndan skaða! Hevur beint fyri 17 mill. ungum sum eldri, higartil, og løstað enn fleiri! Langtíðarárinið av átakinum verður lýst sum ræðandi av óheftu vísindini, sum ikki sleppur til orðana alment! Fráboðað sum neyðugt, skuldi Heilsuverkið ikki ovbyrjast!

Varð læknalyftið Hippocratesar ikki tveitt undir Pfizer bussin, tá sá EUA góðkenningin ongantíð dagsins ljós! Tað er tí sera ørkymlandi, at eitt gleps, fyri sendingina púra óviðkomandi, verður sent eftir Hippocrates, - hugsa vit um óhugnaligu fylgirnar Heilsuverkið, við Pál á odda, hava elvt til!

Varð glepsið føtt av einum útláti um fullkomna samanrenning millum Heilsuverkið og Big Pharma, har læknalyftið endaliga verður avhøvdað, tá eru vit fullkomuliga hjálparleys, og hava onga verju, verða verandi ætlanir, hjá ”Big Pharma-stýrda WHO”, samtyktar í mai 2024.




*Laknayrkið er fyribeint av mentum kliniskum mannagongdum!*
*Neyðugt er at byrja heilt av nýggjum, við nýggjum lærustovnum!*

Heilsuverkið hevur veruliga tørv á at spegla sær í Dr. Richard Amerling!

- og politiska skipanin hevur tørv á at tosa við mannin!







*BRASILIEN: Tað er hugstoytt at eygleiða hvussu Big Pharma fer fram í menningarlondum, har til ber at mutra heilsuverkini. Vit síggja hjartanemandi átakið í Brasilien, har kravt verður at børn í aldrinum 6 mánaðir til 5 ár verða mRNA íleguviðgjørd. Umhugsað verður at seta í verk skúla-koppsetingarstøð, við strongum skásetingarkrøvum.*
*Hetta verður framt væl vitandi, at børn als ikki eru í vandabólki,og kunnu einans taka skaða av eitursproytuni! Somuleiðis vita vit, at eitrandi Lipid nanobitlarnir savna seg í stórum tali í eyggjastokkunum, uttan mun til aldur, til stóran ampa fyri komandi ættarlið!*

**Koppseta undir einari alheimsfarsótt**
Luc Montagnier, lækni, Nobel prísin í medisini fyri at greina HIV virusið, sigur soleiðis um Covid átakið, har koppsett verður, samstundis sum smittan gongur:

> *"Tað er ikki til at skilja, at koppsett verður undir einari alheimsfarsótt. Epidemilogar vita at tað gert tú ikki! Søgubøkurnar koma at lýsa ógvusliga mistakið! Talan er um eitt vísindaligt mistak, eitt medisinskt mistak, eitt mistak sum ikki kann góðtakast"!*

Hinvegin, so lýsti Heilsuverkið við tørvinum, har 80% av tjóðini Føroyar skuldi koppsetast, skuldi fjøldmótstøðuføri náast, tó í djúpastu andsøgn við ástøði lýst í lærubókum, og fráboðað av óheftu serfrøðini, sum ikki er sloppin til orðana alment! Tað sum framt er verður lýst sum skilaleyst, og forðar fyri, at fjøldmótstøðuføri kann mennast. Vit fáa ístaðin eina varandi farsótt. Nú er JN.1 her!

Á henda hátt varð hjartanemandi átakið framt, har barnakonan, bróstakonan og barnið vóru drigin inn í eitt sera vandamiki royndarátak, við óroyndari og eksperimenterandi mRNA íleguviðgerð, lýst av Heilsuverkinum sum koppseting, og seld sum samvitskubit, við ábyrgdini av møguleikanum at beina fyri ommuni, pápanum og grannanum.

Fremsta óhefta vísindin markar atburðin sum ræðandi ábyrgdarleysan, í andsøgn við alt skilvísi! Eitt revsuvert misbrot, tá "*kunnað samtykki*", sambært Sundhedsloven, ikki er framt! Umframt at kunningin Heilsuverkið hevur borðreitt við, hevur verið beinleiðis villleiðandi og ósonn!

**Koppingarevni sum fyrst gerst virki ert tú álvarsliga sjúkur**
Tá Covið átakið tók sína byrjan, var fyrsta kunningin, at koppingarevnið var "trygt og virkið". Var ein koppsettur (mRNA íleguviðgjørdur!), tá gjørdist ein ikki sjúkur, og var ikki til vanda fyri onnur.

Tá tað ikki vísti seg at halda, so sum Pfizer data vístu, tó ikki eftirkannað av okkara eftirlits-stovnum, varð kunningin broytt soleiðis, at ein kundi gerast sjúkur, tó tann koppsetti gjørdist ikki álvarsliga sjúkur. Slagorðið gjørdist tískil, at "koppsetingin vardi væl ímóti álvarsligari sjúku".

Navnframi óhefti serfrøðingurin á økjunum virologi og vaccinologi, Geert Vanden Bossche, var alment úti, har hann markaði eitt tílíkt uppáhald sum "vandamiki nonsens"! Hann stillaði spurningin, um vit áður hava hoyrt um koppingarevni/heilivág, har hesin fyrst gerst virkin ert tú álvarsliga sjúkur.

Bossche lýsir veruligu orsøkina, til "nonsens uppáhaldið" frá Heilsuverkinum, sum ræðandi vandamikla, tá Heilsuverkið tískil eyðsag ikki skilir hvat tikist verður við. Yvirskipað er orsøkin, tey manglandi evnir koppingarevnið hevur, at fáa kveikt neutraliserandi andevnir, har ein einsamøll glucose-mutatión at enda gevur virusinum fría atgong til lunguni. Heilsuverkið hevur sostatt framt eitt átak, sum røkkur júst tað øvuga av tilætlaða, har ment verður ein, av óheftu vísindini, kend vandastøða!

Hjartanemandi at vita sær, at tjóðin Føroyar er drigið inn í eitt átak, sum var dømt at misseydnast, og á allan hátt var betur ógjørt. Lýsta loysnin gjørdist í royndu og veru ein sjúkuelvandi, løstandi og drepandi bomerang, - og møguliga varandi!?

Heilsuverkið kann á ongan hátt vísa á ein heilsuberandi fyrimun við Covid átakinum og mRNA íleguviðgerðini, - als ongan! Og eina skilagóða grundgeving fyri Covid átakið fáa vit ongantíð! Neyvan heldur eina umbering?

Sama úrslitið sýggja vit í dag um allan heim, har mRNA íleguviðgerðin er framd, júst so sum Luc Montagnier og Geert Vanden Bossche ávaraðu um frá fyrsta degi, har tvær áheitanir vóru sendar WHO, um at steðga koppsetingini!

*Amish fólkið, sum tekur frástøðu frá atburðinum MSM, Big Tech og Big Pharma, leggur fyri dagin, settu eingi avmarkandi Covid átøk í verk, og høvdu longu ment fjøldmótstøðuføri í mai mánað 2021. Tey duga ikki at vísa á nakran sum er deyður av farsóttini! Tey dragast heldur ikki við tær mongu sjúkur, hvørki vaksin ella børn, sum annars heldur lív í bróðurpartinum av Heilsuverkinum herheima!*

*Og hesar sjúkur vilja økjast munandi komandi árini, við teimum 3.500+ Peer Review hjáárinum, skaðum, sjúkum og deyðsorsøkum, sum eru beinleiðis knýttar at ”Pfizer eitursproytuni”, so sum Luc Montagnier, Nobel prís í medicini, málber seg í parlamentinum í Luxembourg.*

*Tað hevur eydnast Pfizer at kopiera hugskotið hjá glarmanninum Charli Chaplin, umboðandi Big Pharma, sum hevur fingið smádrong, umboðandi Heilsuverkið, at ganga undan sær og bróta glasrútar. Spurningurin er um glarmaðurin verður gangandi her fleiri ættarlið, so sum Luc Montagnier ber banga fyri?*

**Koppingarevnið verjur bert 0.84% og ikki 95%**
EMA European Medisines Agency (Europæiske lægemiddelstyrelsen) boðar frá, á viðløgdu leinkju, at Pfizer koppingarevnið ongantíð er lýst sum góðkent til fjøldkoppseting, men hinvegin til ”*verju av tí einstaka*”, sjálvsagt eftir tørvi, við fullgóðari kunning, sum **krevur** kunnað samtykki sambært Sundhedsloven!

Somuleiðis verður staðfest, at koppingarevnið ikki hevur fingið góðkenning, har lýsast kann við, at koppingarevnið forar fyri smittu! Júst hetta varð tó nýtt av Heilsuverkinum sum harmaróp og samvitskubit, so øll kundu rekast í rætt.

At Heilsuverkið hevur kunngjørt, at koppsetingin verjur 95%, er villleiðandi kunning, tá talan er um Relativ Risk Reduction sum liggur á 95%.

Tað er álagt Heilsuverkinum at kunna um Absolute Risk Reduction, sum liggur á 0.84%? Stóri spurningurin er hvussu nógv høvdu tikið av tilboðnum um mRNA íleguviðgerð, varð kunningin frá Heilsuverkinum, sum álagt í Sundhedsloven, framd við heilsu okkara fyri eyga?

**Heilsuverkið forar fyri nýtslu av royndum og lívbjargandi ”Covid heilivági”**
Í tíðarskeiðnum áðrenn byrjað varð at koppseta, vóru protokollir mentar av óheftum læknum, at nýta til fyribyrging, hjá tí einstaka, og til viðgerð av teimum sum høvdu tørv á læknahjálp. Talan er um læknar sum taka frástøðu frá Covid átakinum, og hava savnað seg í størri felagsskapir.

Protokollirnar óheftu felagsskapirnir vísa til, eru í stóran mun eins, har nýtt verður Nobel krýndi heilivágurin Ivermectin, sum hevur 35 ára royndir á baki, og er uttan hjáárin als. Millum felagsskapirnar er CCCA (700 læknar og granskarir +). Protokollirnar geva tí einstaka vegleiðing í at taka hond um egnu heilsu sína, - sum fyribyrgjandi Covid heilivágur, og tá ein gerst Covid sjúkur.

Landslutirin í India Uttar Pradesh, við 240 mill. íbúgvum, hevur nýtt Ivermectin at berja niður Covid farsóttina. Somu royndir eru gjørdar í Japan, Suðurafrika, Argentina, Peru, Mexico og á privatum læknastovum í USA, áðrenn FDA setti forboð fyri nýtsluni. Læknar í USA hava mist starvið og aðrir læknaloyvið, har átrokandi neyðug læknahjálp er framd við Ivermectin. Hetta er framt hóast Ivermectin er meinaleysari at nýta enn Panodil og Codimagnyl, sum er til hondkeyps herheima.

Ivermectin heilivágur verður noktaður tær til Covid viðgerð í Føroyum, har als eingin ráðgeving er framd kring fyribyrging, sum ikki er til at skilja, og átaluvert. Hinvegin er framdur ábyrgdarleysur atburður, í stríð við alt skilvísi og fakligar leiðreglur, har Covid smittaður verður lagdur á gistingarhús, við andaneyð, og ikki veittur hjálp, tá ringt verður til LS!

Duldarkent, at fyribyrgjandi ráðgeving og røkt er framd í menningarlondum, við útflýggjan av heilsurøktar-hjálparpakkum, har einasta loysnin, á okkara leiðum, hevur verið at bíða eftir eitrandi Pfizer sproytuni!? Dr. Tina Peers lýsir óskilið!

Í sambandi við nýggja virusfrábrigdið JN.1, er hetta spádómurin hjá Geert Vanden Bossche:
Sí leinkju - JN.1 fær síðsta orðið!

**Heilsuverkið hevur brotið §Sundhedsloven, Kapittul 5 - Kunnað samtykki**
Svenskir læknar, granskarar og onnur heilsurøktarstarvsfólk skriva soleiðis á heimasíðu sínari Läkaruppropet:

Inte en enda av de många miljarder människor som har fått covid-19-vaccin har fått tillräckligt med information för att kunna fatta ett välgrundat beslut om att acceptera vaccinet eller inte, så kallat informerat samtycke. Detta är ett brott mot en av de mest grundläggande principerna för etiska medicinska interventioner och människor över hela världen bör vidta rättsliga åtgärder.
Detta är slutsatsen av en detaljerad artikel av Chris Flowers, läkare och docent i radiologi,om lipidnanopartiklarna i mRNA-vaccinerna. Artikelns slutsats:

> "Lipidnanopartiklar skadar människor och det finns inget känt sätt att ta bort dem från kroppen. Eftersom dessa skador – liksom de fakta att LNP:er färdas genom kroppen, fastnar i organ och inte kan tas bort – inte avslöjades för patienterna innan de fick LNP/mRNA-covid-"vaccinerna", kunde patienterna inte ge informerat samtycke till att få de experimentella covid-läkemedlen.

Trýst á myndina og sí 1: A medical Crisis?, 2: Nanoparticle Invasion,

3: They are dangerous and travel everywhere, 4: Mind-body nano-bioweapon,

5: No informed consent, 6: Unprecedented rates, 7: Unnaturel clots, 8: Conclusion

American Medical Association (AMA), som aggressivt har drivit på för covid-vaccinering, säger: "Informerat samtycke till medicinsk behandling är grundläggande i både etik och juridik. Patienter har rätt att få information och ställa frågor om rekommenderade behandlingar så att de kan fatta väl övervägda beslut om vården... När läkare vill inhämta en patients informerade samtycke... bör läkaren:

1. Bedöma patientens förmåga att förstå relevant medicinsk information och konsekvenserna av behandlingsalternativ och att fatta ett självständigt, frivilligt beslut.
2. Presentera relevant information på ett korrekt och lyhört sätt, i enlighet med patientens preferenser för att ta emot medicinsk information. Läkaren bör inkludera information om:
    1. Arten och syftet med rekommenderade insatser
    2. Belastning, risker och förväntade fördelar med alla alternativ, inklusive att avstå från behandling
3. Dokumentera samtalet om informerat samtycke och patientens… beslut i journalen. När patienten... har lämnat ett specifikt skriftligt samtycke, ska samtyckesformuläret inkluderas i journalen."

Eftersom dessa grundläggande åtgärder inte vidtogs, agerade regeringar, folkhälsomyndigheter, medicinsk personal och företag, med hänvisning till AMA, på ett oetiskt sätt mot miljarder människor som har fått covid-vaccin över hela världen.

*Amerikaner och andra måste vidta rättsliga åtgärder mot dem som misslyckades med att uppfylla en av de mest grundläggande principerna för etiska medicinska ingrepp."*

**§Heilsuverkið hevur framt revsuvert misbrot**
Heitt verður við hesum á koppsetta, og avvarðandi, at lurta eftir navnfromu Dr. Dolores Cahill, sum ger vart við týðandi viðurskifti, sum yvirskipað kann lýsast sum ein samandráttur av Covid átakinum, og vandunum knýttir at mRNA íleguviðgerð, júst so sum óhefta vísindin annars hevur larmað um alt Covid tíðarskeiðið.

Dr. Cahill is a Professor of University College Dublin and was Group Leader of the Max-Planck-Institute in Berlin, Germany from 1995 to 2003. She is an Inventor, Founder and Shareholder of companies and has international Patents with applications for improving the early diagnosis of diseases such as auto immune diseases & cancer.

Dr. Cahill has been an Expert in the EU for some 15 years in Future & Emerging technologies. Professor Cahill's latest business ventures include the World Freedom Alliance, a worldwide platform of organisations offering access to justice, true dialogue for health science and politics, holding worldwide officials to account under the law. The World Freedom Alliance offers transparent evidence-based solutions and encourages robust debate with media, scientists and governments to ensure fundamental freedoms for people of the world.

*Dr. Dolores Cahill*

Dr. Dolores Cahill lýsir á eyðskildan hátt Covid átakið, hvørji misbrot eru framd, og hvussu tann einstaki koppsetti, ella avvarðandi, kann ábyrgda tey sum hava framt mRNA íleguviðgerðina. Tað er ikki neyðugt at fara í rættin! Løgfrøðiliga lýsingin er at finna úti á 29:44 min.

Tað er ábyrgdin hjá okkum øllum, at borga so fyri, at tílík illgerð ikki fær loyvi til at endurtaka seg. Heilsuverkið hevur valt at ganga plankan út, við støðugum boostarum! Tað er av týdningi, at tey verða ábyrgdað, sum hava luttikið í illgerðini. Verður tað ikki framt, tá svíkja vit børn og barnabørn okkara!

Almenni fjølmiðilin KVF, sum einans hevur latið Heilsuverkið, við Big Pharma boðskapinum, koma til orðana, hevur ikki veitt nøktandi "Covid kunning", sambært góðum fjølmiðlasiði, álagt sambært ásettum leiðreglum av Fjølmiðlanevndini:

*1. Fjølmiðlarnir í samfelagum!*

*1.1 Talu-, skrivi- og kunningarfrælsi eru týdningarmiklir grundarsteinar í einum fólkaræði, og fyri at tryggja hetta frælsi krevst, at fjølmiðlar eru óheftir.*
*1.2 Fjølmiðlar eiga at bera tíðindi, upplýsa, kunna, íbirta orðaskifti og at viðgera samfelagslig mál kritiskt. Fjølmiðlar hava tí serstaka ábyrgd av, at øll viðkomandi sjónarmið verða lýst.*
*1.3 Fjølmiðlar skulu verja talu-, skrivi- og kunningarfrælsið. Fjølmiðlar eiga tí ikki at lata óviðkomandi áhugamál forða frælsari kunning, frælsari atgongd at heimildum ella forða orðaskifti um samfelagslig mál ella viðurskifti.*
*1.4 Fjølmiðlar eiga at verja einstaklingar og bólkar fyri órætti frá almennum myndugleikum og stovnum, fyritøkum ella øðrum felagsskapum.*
*1.5 Fjølmiðlar hava rætt og skyldu at kunna um tað, ið hendir í samfelagnum og at avdúka ivasom viðurskifti.*

KVF hevur á henda hátt samábyrgd av, at illgerðin kundi fremjast í verki, tá óhefta vísindin ongantíð er sloppin til orðana, - og als einki er gjørt fyri at avdúka ivasom viðurskifti!

**Verandi mRNA íleguviðgerð er sjúkuelvandi og skaðilig - endurtikin er hon drepandi**
Verandi eksperimenterandi og eitrandi mRNA íleguviðgerð, nýtt sum fjøldkoppseting, uttan fullgóða kunning til greiða støðutakan, er í sjálvum sær revsuverd!

At hetta, læknafrøðiliga, verður hugsað sum loysn, til verju ímóti virus smittu, har billiónir av Lipid nanobitlum verða sendir til øll yrkisgøgn, heila, hjarta, livur, …, somuleiðis til mergin, har blóðkyknurnar verða framleiddar, og til eggjastokk, uttan mun til aldur á kvinnu, fyri soleiðis af fáa ment skerd ikki-nevtraliserandi andevnir, sum eru til ampa fyri immunverjuna, er ein hjartanemandi

illgerð, sum tænir einans einum endamáli, - at økja um inntøkuna hjá Pfizer ognarum! - og er á ongan hátt framt við heilsu okkara fyri eyga!

**Ein sjúkur læknaheimur í upploysn!?**
***1***: *Dr. John Campbell fer her ígjøgnum læknafakliga frágreiðing sum "sigur seg prógva", at tey ikki-koppsettu eru til vanda fyri onnur í ferðsluni, - tó tað er staðfest, at stórur partur av teimum koppsettu dragast við "Brain fog", "Memory and concentration problems", "Eyesight changes", "Myocarditis", "Blood clots", ... sí yvirlitið yvir hjáárin 3.500+!*

*Lurtar tú ikki eftir Heilsuverkinum, og letur teg "koppseta", tá steðgar tú heldur ikki fyri reyða ferðsluljósinum! Ja, tú ert til ampa fyri onnur, og kanst taka lívið av ommuni, pápanum og grannanum, sambært lýsingarherferðini hjá Heilsuverkinum!*

***2***: *Kanadiski læknin Mel Bruchet varð handtikin og lagdur á sinnisjúkrahús, tá hann boðaði frá alment, at 13 barnakonur, sum allar vóru fult "koppsettar", høvdu føtt deyðfødd børn. Barnakonurnar føddu allar sama døgnið á Lions Gate Hospital í Kanada. Vanligt er at síggja eitt deyðføtt barn um mánaðin.*

*Í 25 dagar var hann innlagdur og medisineraður, tá tað eydnaðist honum at rýma. Nú goymur hann seg, væl hjálptur av læknanum Daniel Nagase, sum annars misti starvið, orsaka av nýtslu av Ivermectin til viðgerð av eldri sjúklingum.*

***3***: *Trond Harald Haaland som har vært tvangsinnlagt på psykiatrisk enhet på SUS i Stavanger i 9 dager, på grunn av saker han har postet på Facebook, kunne gå ut i det fri etter møte i kontroll-kommisjonen fredag 28. juli 2023.*

*Det etterlater seg liten tvil om at dette er en sykiatrisk tvangsinnleggelse, som er gjort på grunnlag av politiske ytringer på Facebook, med ellers helt fraværende grunnlag.*




## Tucker Carlson Interviews Dr. Aseem Malhotra

***On The Corruption Of Medicine By Big Pharma***

*Fyriskipaði óttin gjørdist umfarssóttin. Sannleikin er heilivágurin!*
*Nær verður sannleikin borin okkum, og tikin við inn í eitt fevnandi hjálparátak?*

*hippocrates.fo*
*29.11.2023*
*(Broytt 23.01.2024)*